# Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# JAVNSTØÐA Á ARBEIÐSMARKNAÐI

Seinastu vikuna eru tvey sjónarmið um kvinnur í barnsburðarfarloyvi og teirra rættindi. Fyrra sjónarmiðið kom frá Føroya Handverkarafelag, sum vísti á ein dóm í Føroya Rætti, har ein kvinna, sum varð søgd úr starvi, við dómi fekk løn í seks mánaðir frá arbeisgevara sínum, tí hon varð søgd upp av órøttum – tí hon var við barn. Arbeiðsgevarin kundi ikki prógva, at hann ikki hevði sagt kvinnuna úr starvi, tí hon var við barn.

Føroya Handverkarafelag, sum varðar av kvinnuni sum fakfelag fegnast um dómin – tí, sum felagið sigur, at við hesum verður sligið fast, at tað skal ikki loysa seg at skúgva lógarfest rættindi í sambandi við barnsburðarfarloyvi til viks.

Vit geva verkafelagnum púra rætt í hesum. Øll slík vunnin rættindi skulu virðast. Vit eiga eisini sum heild at virða tørvin hjá báðum foreldrum at vera heima hjá nýføddum barni nógv meira. Barnsburðarfarloyvi eigur at verða longri, og mammur og pápar eiga at verða javnsett, hvat barnsburðarfarloyvi viðvíkur.

Kringvarpið vist fyrr í vikuni at siga frá danskari kanning, at arbeiðsgevarar í har vilja hava rætt til at siga kvinnur í barnsburðarfarloyvi úr starvi. Hesum vísir Føroya Arbeiðsgevarafelag tó aftur. Felagið vísir á, at kanningin vísti, at arbeiðsgevararnir ynskja ikki at geva kvinnum við barn ella í barnsburðarfarloyvi betur rættindi, enn onnur fáa. Felagið vísir á, at javnstøðulógin sigur, at tað er ikki loyvt at gera mismun vegna kyn, og at hesum taka arbeiðsgevararnir undir við. Arbeiðsgevararnir taka eisini undir við, at kvinnur ikki skulu vera fyri mismuni, tí tær eru við barn ella í barnsburðarfarloyvi. Tó ger arbeiðsgevarafelagið púra greitt, at ein kvinna við barn ella í barnsburðarfarloyvi ikki eigur at verða friðhalgað í eini uppsagnarrundu.

Tað er gott at verja barnakonurmen vit eiga sjálvandi at ansa eftir, at vit ikki gera hesum kvinnum



eina bjarnatænastu. Tí hetta kann føra til, at arbeiðsgevarar himprast við at seta kvinnur í burðarførum aldri í starv, tí teir eru bangnir fyri avleiðingunum.

Tað er tí av týdningi, at kvinnur og menn – og kvinnur, sum fara í barnsburðarfarloyvi, og kvinnur sum ikki fara tað - verða javnsett á arbeiðsmarknaðinum. Slíkum eiga bæði javnstøðulógin og lógin um barnsburðarfarloyvi at taka atlit til.

**Mugu ikki gera kvinnum eina bjarnatænastu**

## Studni – nýggja navnið á Stuðulsstovninum



Stuðulsstovnurin skriftir nú navn til Studni.

Tá ið Stuðulsstovnurin varð settur á stovn í 1988, varð fyrst og fremst hugsað um peningaligan stuðul, tá ið orðið »stuðul« varð nevnt, t. d. stuðul til fiskivinnuna ella lestrarstuðul. Í dag hevur »stuðul« ofta merkingina: at stuðla menningartarnøaðum ella fólki við sálarligum ella likamligum breki.

Tað er ikki so sjáldan, at starvsfólkini á Stuðulsstovninum møta hesi uppfatan, tá ið tey siga, at tey arbeiða á Stuðulsstovninum. Hetta er ein av orsøkunum til navnabroytingina.

Ein onnur orsøk til at broyta navnið er, at Stuðulsstovnurin ofta verður blandaður saman við aðrar stovnar. Talan er altíð um stovnar, ið taka sær av fólki við breki. T. d. hevur Stuðulsstovnurin ofta verið blandaður saman við Sernámsdepilin, og fólk hugsa ofta eisini um Stuðulstænastuna hjá Nærverkinum og Stuðulsfólkaskipanina hjá Almannastovuni, tá ið tosað verður um Stuðulsstovnin. Aðrir líknandi stovnar eru Stuðulsstovan og Stuðulstoymið.

## 206 ung sleppa til arbeiðis

440 teknaðu seg til »Ung í arbeiði« hjá Tórshavnar kommunu, og nú hava 206 av teimum ungu fingið boðið arbeiði.

Tað ber til at fara inn á heimasíðuna www.torshavn.fo og síggja, hvør er sloppin við og hvar viðkomandi skal arbeiða.

Átakið er í tíðarskeiðnum frá 28. juni til og við 23. juli.

Tey ungu fara at gera ymiskt fyrifallandi arbeiði, so sum smáumvælingar, lúka og sópa gøtur, mála og rudda fyri at fríðka um kommununa.



**Misskilt nationalisma**

HELGI ABRAHAMSEN
KJAK Á SÍÐU 12



**Alt vald frá Føroya fólki**

KÁRI Á RÓGVI
KJAK Á SÍÐU 15

## Finska vetrarkríggið á føroyskum

Norska skaldsøgan »Høggararnir« eftir Roy Jacobsen kemur nú út í føroyskari umseting. Skaldsøgan snýr seg um menniskju og lagnur í finska vetrarkrígnum. Um menniskjakærleika, um stórleikan í lítlu menniskjuni og heilagleika lívsins. Forlagið sigur, at »Høggararnir« er ein hugtakandi tilverulig skaldsøga um sjey menn, sum mugu taka toyggið í felag, um brenni og hita og einar damuskógvar. Og um orðið »takk«.




Høvundurin, Roy Jacobsen, f. 1954, er ein av viðurkendastu høvundunum í Noregi. Bøkur hansarar er komnar út í 21 londum, og hann hevur fingið hópin av virðislønum, eitt nú Ivar Lo-prisen, Kritikerprisen, Gyldendalprisen, Bokhandlerprisen (tvær ferðir) og ikki minst Ungdommens Kritikerpris 2005 fyri júst »Høggararnir«, sum er týdd til 12 onnur mál.

Í grundgevingini fyri virðislønina segði dómsnevndin eitt nú soleiðis:

»Glæsiligar, veruligar og glógvandi lýsingar, sum taka okkum á bóli og senda okkum nøtrandi kylingar niður eftir bakinum.«

Bókin er 176 síður og Jákup í Skemmuni týddi bókina og útgevari er forlagið Nýlendi.

»Eitt tølandi og tilveruliga skakandi meistaraverk«. (Kristeligt Dagblad)

*rigmor@sosialurin.fo*

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*